Tekniski Skúlin Klaksvík

## Lærari til Maskinøkið

Søkt verður eftir undirvísara at byrja í mars 2007.

Talan er um fast starv.

Vit kundu hugsað okkum

- at tú hevur hug at undirvísa,
- hevur sveinabræv sum maskinsmiður og
- tað er ein fyrimunur um tú hevur víðari útbúgving og kunnleika innan kunningartøkni.

**Setanartreytir o.a.**
Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum innan 15. februar.

Eru spurningar, so eru áhugaði vælkomin at venda sær til Jan Erik Hansen, deildarleiðara ella Rúna Heinesen, skúlastjóra, tlf. 456311 ella fartelefon 214407.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
Fo-700 Klaksvík

Tekniski Skúlin í Klaksvík er sjálvognarstovnur og vinnuskúli. Á skúlanum eru miðnámsútbúgvingarnar, HT og SIT, og skúlagongd fyri handverkslærlingum innan el-, maskin- og timbur yrki. Aðalmál skúlans er, at vera kendur fyri eitt gott skúlaumhvørvi og fakliga og námsfrøðiliga menning.

## Eftirlýsing

Tann sum var á vitjan hjá mær uml. 30. des. og tók mín stav í gongini og setti sín egna eftir, biðist vinarlig ringja til mín ella at koma inn á gólvið við stavinum.

Eg hevði fegin vilja fingið hann aftur.

**Hensia Jacobsen**
Syðrugøtu
Tlf. 441014


Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Sosialurin 341800


## Leiðari til barnagarð í Skálafirði

Barnagarðurin í Skálafirði fer at halda til í hølum hjá Kelduni í Skálafirði. Har er stutt til fjøru, sand, á og haga. Byrjað verður við at seta á stovn vøggustovu við 12 børnum, seinni kann tilboðið økjast við einari stovu afturat í mun til tørvin á barnaansing.

Runavíkar kommuna hevur tikið stig til at byggja nýggjan barnagarð í Søldarfirði og á Skála. Tá barnagarðarnir verða tiknir í nýtslu, er ætlanin at børn, starvsfólk og leiðsla flyta á nýggju stovnarnar.

Vit sóknast tí eftir einum sjálvstøðugum persóni, ið hevur áræði at byggja upp ein nýggjan ansingarstovn frá grundini.

**Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Harumframt hevur hann ábyrgd av:**

- at stovnurin er í støðugari menning
- at starvsfólk trívast og mennast
- at tað støðugt verður arbeitt við at menna námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og út frá teimum fortreytum sum stovnurin virkar undir.
- At samstarva við kommunalu umsitingina, við aðrar leiðarar innan barnaansingina og við aðrar viðkomandi stovnar

**Vit leita eftir leiðara, ið...**

- er útbúgvin námsfrøðingur
- er førur fyri at skera ígjøgnum og taka avgerðir
- er nýhugsandi og ígongdsetandi
- hevur góð samstarvsevni
- evnar at eggja og menna starvsfólkið
- hevur góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- hevur telduførleika á brúkarastøði

Er eingin útbúgvin pedagogur millum umsøkjararnar, kann kommunan seta fólk við aðrari viðkomandi útbúgving í starvið.

**Vit bjóða**

- eitt sjálvstøðugt starv við avbjóðingum
- eitt mennandi umhvørvi, har tað altíð er møguleiki at fáa ráðgeving og hjálp

**Setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Leiðarastarvið verður lønt á stig 19-25. Leiðarin vísir beinleiðis til sosialdeildarleiðaran í kommununi.

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

**Søk starv**
Við at senda Runavíkar kommunu eina umsókn í seinasta lagi 23. februar 2007, kl. 12:00.



**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-600 Saltangará

## Pedagogar og hjálparfólk til barnagarð í Skálafirði

Søkt verður eftir 2 pedagogum á 30-40 t. um vikuna, og eftir 2 hjálparfólkum 30-40 t. um vikuna til arbeiði á vøggustovu. Størvini verða sett 1. apríl ella skjótast gjørligt.

Barnagarðurin í Skálafirði fer at halda til í hølum hjá Kelduni í Skálafirði. Har er stutt til haga, á, fjørðu og sand. Byrjað verður við at seta á stovn vøggustovu við 12 børnum, seinni kann tilboðið økjast við einari stovu afturat í mun til tørvin á barnaansing. Tá virksemi á stovninum økist verður eisini møguleiki at arbeiða við størri børnum.

Runavíkar kommuna hevur tikið stig til at byggja nýggjan barnagarð í Søldarfirði og á Skála. Tá barnagarðarnir verða tiknir í nýtslu, er ætlanin at børn, starvsfólk og leiðsla flyta á nýggju stovnarnar.

**Vit leita eftir umsøkjarum ið**

- hava umsorgan fyri børnum
- hava góð samstarvsevni
- duga væl at samskifta
- eru ídnir, nærlagdir og álítandi
- hava gott yvirlit og mega at skipa dagin
- eru nýhugsandi og ígongdsetandi
- evna at orða seg munnliga og skrivliga

Um tað mangla útbúnir pedagogar til pedagogstørvini, verða hjálparfólk sett í staðin.

**Setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Pedagogar verða løntir á stig 11-17 og hjálparfólk á stig 1-5.

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

**Søk starv**
Við at senda Runavíkar kommunu eina umsókn í seinasta lagi 23. februar 2007, kl. 12:00.



**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-600 Saltangará


Vit átaka okkum alt mekaniskt arbeiði

ØLL BILSLØG

Søla av FULDA dekkum




BILVERKSTAÐIÐ · TLF. 50 79 77
485 Skálafirði


Lesið Sosialin - so eru tit við